betri

# Leysafætrygging

**Við eini Leysafætrygging fært tú eina trygging, ið hóskar til títt virksemi. Tryggingin dekkar títt innbúgv, maskinur, vørur og leysalutir.**

**Hvat fevnir tryggingin um**
Leysafætryggingin tryggjar títt leysafæ móti skaða av eldi, vatni, stormi, omanlopi, innbrotsstuldri, ráni og av fleiri øðrum orsøkum.

Tryggingin dekkar leysafæ í bygningum, har tú hevur títt virksemi. Í leysafæið verða roknaðir allir lutir og allar innleggingar, sum ikki eru partur av sjálvum bygninginum.

Um skaði hendir, verður endurgjaldið ásett eftir teimum tryggingarhæddum, sum eru avtalaðar í tryggingarskjalinum. Vit ráðgeva tær um, hvussu tú metir virðið á tínum innbúgvi, vørum, maskinum og øðrum leysafæi, soleiðis at leysafæið altíð er rætt tryggjað.

Er tryggingarhæddin rætt ásett, innan 15 teir seinastu mánaðirnar, verður tryggingarhæddin hækkað við 25%. Sostatt sleppur tú undan at boða okkum frá smáum, dagligum íløgum. Er talan um størri íløgur, skulu hesar fráboðast okkum beinanvegin, tí talan kann verða um undirtrygging, um tryggingarhæddin er ov lág.

Tryggingin dekkar útreiðslurnar av at bjarga tínum leysafæi, um skaði hendir ella er um at henda. Vit gjalda eisini fyri at rudda og at burturbeina tað skadda leysafæið.

**Tryggingin kann víðkast til tín tørv**
Tørvurin á trygging er ymiskur. Tú kanst t.d. velja hesi ískoyti til tína Leysafætrygging:

**El-skaðatrygging (ískoyti)**
El-skaðatryggingin dekkar elektrisk og elektronisk tól, komponentar og leiðingar, ið hoyra til rakstur av virkinum. Talan er t.d. um motorar, generatorar, transformarar, stýriútbúnað, radio- og sjónvarpsútgerð.

Ein el-skaði er ein skaði, sum er hendir av skammlopi (kortslutningi), yvirspenningi ella induktion.

**All riskstrygging (ískoyti)**
All riskstrygging er - sum heitið sigur - ein trygging, sum dekkar allar skaðar á leysafæið, sum ikki eru undantiknir.

Talan er um ein og hvønn beinleiðis fysiskan skaða á leysafæið, sum hendir brádliga og óvæntað.

**Glastrygging (ískoyti)**
Glastryggingin dekkar brot á rútar og annað glas, sum er partur av bygninginum, ið tú leigar. Tryggingin dekkar í tann mun bygningstryggingin ikki dekkar.

Rútar kunnu vera sera kostnaðarmiklir, og tí er henda trygging eitt gott ískoyti til tína Leysafætrygging.

**Kummutrygging (ískoyti)**
Kummutryggingin dekkar wc-kummur, sisternur, bidet, vøsk og baðikør í hølum, ið tú leigar, um tey brotna. Tryggingin dekkar í tann mun bygningstryggingin ikki dekkar.

Hesir lutir kunnu vera kostnaðarmiklir, og tí er henda trygging eitt gott ískoyti til tína Leysafætrygging.

**Kuldatrygging (ískoyti)**
Kuldatryggingin dekkar tínar vørur, sum verða goymdar í køli- og frystiútgerð.

Tryggingin dekkar, um vørurnar verða oyðilagdar av, at kuldin minkar ella økist, orsakað av brádligum breki í kølimaskinarínum, útstreyming av køliløgi, streymsliti ella aðrari brádligari og óvæntaðari hending.

**Flutningstrygging (ískoyti)**
Við eini Flutningstrygging tryggjar tú tíni amboð, tíni tól, tínar vørur og vørur hjá øðrum undir flutningi í Føroyum.
Tínir lutir eru við hesi trygging tryggjaðir móti øllum brádligum fysiskum skaðum, sum ikki eru undantiknir.

Henda trygging er tí eitt gott ískoyti til tína Leysafætrygging, sum dekkar tínar lutir, meðan teir eru á tryggingarstaðnum.

**Tóltrygging (ískoyti)**
Tryggingin dekkar tíni tól og tína útgerð, tá ein brádligur og óvæntaður skaði hendir, sum kemur uttanífrá. Tryggingin dekkar eld, stuldur og annan beinleiðis skaða.

Tóltryggingin dekkar tól, sum eru á tryggingarstaðnum og tól, ið eru aðrastaðni í Føroyum. Hon dekkar bæði innandura og uttandura. Tryggingin kann víðkast til eisini at galda uttanlands.

**Flytandi samskiftisútgerð (ískoyti)**
Henda trygging tryggjar tína fartelefon, farteldu, prentara og aðra samskiftisútgerð undir flutningi og á goymslu um allan heimin.

betri

# Leysafætrygging

Tínir lutir eru við hesi trygging, tryggjaðir móti øllum brádligum skaðum, ið koma uttanífrá, og sum ikki eru undantiknir.

Harumframt fevnir tryggingin um skaða av skammlopi, yvirspenningi og induktión.

Tryggingin er tí eitt gott ískoyti til tína Leysafætrygging, sum dekkar tínar lutir, meðan teir eru á tryggingarstaðnum.

**Meirkostnaðartrygging (ískoyti)**
Eftir ein skaða, sum Leysafætryggingin dekkar, kanst tú við eini Meirkostnaðartrygging fáa endurgoldið tær útreiðslur, sum tú hevur av at leiga onnur høli, at flyta og at hýsa títt leysafæ v.m., um skaðin hevur gjørt tíni høli ónýtilig.

Endamálið við tryggingini er at dekka meirkostnaðin av, at virksemið heldur fram í øðrum hølum eftir ein skaða. Tá tú teknar tryggingina, avtala vit, hvussu langt tíðarskeiðið skal vera.

Tú kanst eisini tekna eina Meirkostnaðartrygging, sum t.d. fevnir um meirkostnaðin av at nýta aðra útgerð og at flyta í onnur høli eftir ein skaða, sum KT tryggingin ella Maskinskrokktryggingin fevna um.

**KT trygging (ískoyti)**
Tryggingin dekkar tína KT útgerð, ið er sett upp á tryggingarstaðnum. Tryggingin dekkar teir skaðar, ið ikki eru undantiknir.

**Maskinskrokktrygging (ískoyti)**
Hevur tú stórar maskinur og útgerð, ið hava avgerandi týdning fyri títt virksemi, er skilagott at tekna eina Maskinskrokktrygging. Tryggingin fevnir um tryggjaðu lutirnar, sum eru uppsettir á tryggingarstaðnum.

Maskinskrokktryggingin dekkar brádligar og óvæntaðar skaðar á maskinurnar.

**Maskinrakstrartapstrygging (ískoyti)**
Tú kanst tekna eina Maskinrakstrartapstrygging afturat tíni Maskinskrokktrygging. Maskinrakstrartapstryggingin dekkar niðurgongdina í skiftisavlopinum, sum stendst av, at maskinan er óvirkin av einum skrokkskaða.

**Databeraratrygging (ískoyti)**
Hevur tú teknað eina KT Trygging, eina Maskinskrokktrygging ella Trygging fyri flytandi samskiftisútgerð, mæla vit til, at tú teknar eina Databeraratrygging. Tryggingin fevnir um kostnaðin av at lesa mist data inn av nýggjum, eftir ein skaða, sum tryggingin hevur veitt endurgjald fyri.

**Rakstrartapstrygging (ískoyti)**
Tá skaði hendir á einum virki ella í eini fyritøku, hevur hetta oftast við sær, at virksemið minkar ella steðgar heilt. Hetta ávirkar raksturin.

Tí mæla vit til, at tú teknar eina Rakstrartapstrygging, sum dekkar tapið í skiftisavlopinum, orsakað av einum skaða, sum tryggingin dekkar.

**Antennutrygging (ískoyti)**
Antennutryggingin fevnir um antennur við tilhoyri, so sum festing, fundament og kaðalar. Tryggingin veitir m.a. endurgjald fyri skaðar av eldi, skammlopi, stormi, stuldri og herverki.

**Skeltitrygging**
Vit tryggja títt skelti. Hevur tú skelti, sum annaðhvørt eru fest á bygning ella standa leys, kanst tú tryggja tey hjá okkum. Tryggingin dekkar skaðar av eldi og broti.

**Fá meira at vita**
Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um tryggingina. Vitja okkara heimasíðu betri.fo og les meira.

Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600, og fáa nærri vegleiðing frá einum av okkara ráðgevum.m.